# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Loksins eitt valdømi

Løgtingið samtykti í gjár uppskot frá Edmund Joensen, løgtingsformanni at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Síðst í hesi vikuni verður endaliga viðgerðin av málinum. Eftir øllum at døma verður uppskotið samtykt tá eisini.

Tað er greitt, at talan verður um eina kollveltandi broyting í okkara valskipan, eina broyting, ið fer at hava bæði fyrimunir og vansar. Vit taka undir við hesum uppskoti og hava m.a. grundgivið tað við, at hetta vil vera best fyri Føroyar uppá longri sikt. At vit fara at vera betri før fyri at skipa samfelagið til frama fyri øll við teimum avmarkaðu ressursum vit hava. At vit vónandi fáa meira professionellar politikarar, sum fara at taka fyrilit fyri tí tilfeingi, sum vit hava at ráða yvir, hóast vit eru fullgreið yvir, at eingin automatikkur er hesum viðvíkjandi.

Fyri allar Føroyar er sunnast og best, at vit skipa alt landið sum eitt valdømi. Alt ov ofta hevur bygda, kommunu- ella økispolitikkur verið avgerandi tungan á vágskálini, tá vit hava havt brúk fyri at reka landspolitikk. Landsplanlegging, sum átti at verið stýringslykilin, hevur mangan verið í aðru røð. Nú vit mugu til at hugsa og virka øðrvísi. Hóast vit telja færri enn 50.000 fólk, so hava vit ikki dugað nóg væl at húsast við tí avmarkaða tilfeingi, sum er tillutað okkum. Útbygda undirstøðukervið hevur knýtt okkum øll meira saman, uttan at vit hava tikið avleiðingarnar umstingarliga. Hetta má framyvir síggjast aftur í planlegging av íløgum og rakstri. Tað meta vit eitt valdømi best kann borga fyri, um teir røttu politikarnir verða valdir.

Landið er útbygt í ávísan mun út frá krøvum frá lokal- ella økispolitikarum og ikki út frá, hvat tænir samlaðu Føroyum best, hóast sigast skal, at nógvar av hesum útbyggingunum sum t.d. brúgvin tvørturum Streymin og Vágatunnilin hava verið stak væl eydnaðar. Ov nógvar íløgur eru gjørdar, uttan at taka tær við í eina landsplanlegging, so at vit hava fingið ein samfelagsrakstur, sum er hareftir. Dømi um hetta er sjúkrahúsøkið. Ístaðin fyri at brúka orkuna uppá at gera eitt vælvirkandi og optimalt meginsjúkrahús, hava vit spjatt íløgurnar til trý sjúkrahús, harvið einki er nóg vælvirkandi. Sama kundi verið sagt um skúlaøkið, har ov lítil landsplanlegging hevur verið fyri framhaldsskúlar og miðnámsskúlar.

At vit hava fingið bygt út landið alt fegnast vit øll um. Men framtíðin krevur av okkum, at ein broyting kemur í, so vit raðfesta íløgur og rakstur út frá tí tøku orkuni og hvat tænir øllum samfelagnum best. Eitt valdømi fer at seta nógv størri krøv til politikararnar, men samtíðis mugu vit eisini geva teimum betri umstøður í sínum arbeiði. Føroya land krevur eitt nýtt lið av politikarum, sum alt um somu tíð kunnu hugsa lokalt, landspolitiskt og globalt.

**Sosialurin**

## Føroyar eitt valdømi?



EYÐUN M. VIDERØ
Sandur

Vóru menniskju so góð, sum tey áttu at verið, so var óneyðugt við allari løggávu!

Nú er næstan komið á mál hjá teimum, ið hava álit á, at jólamaðurin fer at verða virkin í politiska arbeiðinum á løgtingi. Øll fáa tað, ið tey hava uppiborið, og mugu sjálvsagt gjalda fyri gávurnar! Fyritreytin er tó, at vit fáa Føroyar til eitt valdømi!

Hoyrdi ein part av umrøðuni á tingi, men fekk meiri burturúr "fimmaranum" hjá úrtvarpinum seinni í dag.

Útvald til orðaskiftið vóru tvær vælútbúgvnar kvinnur, ið helst hava sítt arbeiðspláss í Havn, Zacharias Wang og formaðurin í Norðoya Sambandsfelag.

Hvat var so at heinta har?

Kvinnurnar vóru rættuliga sannførdar um, at um bert eitt valdømi var, so vildu valdu politikkararnir heldur enn nú vísa seg sum "landspolittikarar"! Sum um hetta ikki í løtuni er veruleikin hjá politikkarum valdir í miðstaðarøkinum!

Sambandsumboðið var rættuliga ivasamt um, hvussu útjaðarin fór at verða umsitin, um stóra fólkatalið í miðstaðarøkinum fekk avgerandi myndugleikan, um t.d. nakað meiri varð gjørt við sjúkrahúsini í Klaksvík og Tvøroyri, men hetta varð ikki nevnt aftur. Tann áhugaverdi Zakaris Wang hevði sínar søguligu sniðfundugu viðmerkingar, men einki varð tikið til nærri umrøðu. Orðstýrarin var bert vanligur trúgvur mikrofonhaldari!

Aftaná hevði eg í hvussu so er tann ósvaraða spurningin frá Zakaris: Grundgevingin fyri viðmæli av uppskotinum hjá tveimum framstandandi politikarum er, at Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard eru annars bangnir fyri ikki av verða afturvaldir!! Við seinasta val fekk Jóannes Eidesgaard færri atkvøður á Tvøroyri enn Sverre Midjord! Ongin viðmerking í panelinum!

Hvat kunnu vit so vænta verður broytt í sinnalagnum í løgtinginum, um somu verða afturvaldir eftir broyttu skipanini um eitt valdømi?

Onki uttan framhaldandi breyðpolitikkur, og hjá uttanfyristandandi viðhaldsfólki til broyttu skipanina: Nøktandi politiskt onani!

Men tað verður verri at lívbjarga sær í útjaðaranum!

## Endiliga kom Hovstunnilin



ANNIKA OLSEN
Fólkaflokkurin

Tað var ein frøi fyri meg leygardagin tann 20. okt. at koyra ígjøgnum nýggja Hovstunnilin fyri fyrstu ferð. Eitt valaverk, væl frágingið í allar mátar, gjørt av tí íslendska felagnum Ístak.Tunnilin er bæði ljósur og vinarligur at koyra ígjøgnum, fyri ikki at tosa um tað vegarbeiðið við báðar tunnilsmunnarnar, ið er eitt satt valaarbeiði.

Tað hevur mangan verið baldrut at koyrt yvir Hóvsegg í tøttum mjørka ella kavaroki, gleri og stormi, so nú hava suðuroyingar langt um leingi fingið virðiligt vegasamband bygdanna millum.

Semjan um Hovstunnilin hevur tikið drúgva tíð, men leingi er tað, ið væl skal vera, tí gott er, at tunnilin kom ígjøgnum, har hann er nú, og ikki uppi í fjallinum nærri Hovseggini, tí so var einki vunnið. Her er enn eitt dømi um eina rætta loysn, tá ið suðuroyingar standa saman.

Fólkaflokkurin kann fegnast um, at hava havt ein virknan leiklut í øllum framtøkum, ið hend eru fyri Suðuroynna í seinastuni. Nýggjan Smyril, nýggja ferjulegu við termunali á Krambatanga, Djúphavn í Vági og nú Hovstunnilin.

Sett er út í kortið við nýggjum eftirskúla í Hvalba, og er tað mín vón, at hesin skúli verður til veruleika. Suðuroyingar fáa eisini ein miðnámsskúla í Hovi í næstum, spell at hann ikki varð bygdur í Vági sum upprunaliga ætlað, men vónandi fer hesin skúli at betra um umstøðurnar hjá ungdóminum í oynni. Líka so umráðandi tað er, at vegasambandið er gott, og eitt gott samband er til meginøkið, líka so umráðandi er tað, at ungdómurin støðast og trívist í oynni, soleiðis at Suðuroyggin framhaldandi kann menna seg.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.